garanturin fyri, at stovnarnar koma fyri seg aftur, meðan teir sjálvir langt frá trúgva tí teir siga? Um somu tíð tað verður roynt at purra føroyskar politikkarar út, er neyðugt at siga stjórnini frá, at tað, sum fer fram nú, kann koma at kosta føroyingum Føroyar og kann koma dønum dýrt at standa: Tí tað er ikki útlit til nakra bjarging av fiskastovnunum so leingi vit halda fast um tað fiskivinnuteknologi, ið hevur nærum forkomið okkum. Mest sannlíkt er tí, at tað í Føroyum bert verður danskur "overførselskapital"ur eftir at fíggja alt við.
Danska stjórnin hevur sýnt, at hon reagerar trekt og alt ov seint uppá sjálvt tíðulig signalir úr Føroyum, meðan føroyskir politikarar als ikki reagera uppá nakað sum helst.
Her eru tiskil góð ráð dýr. Um børn verður sagt, at brenna tey seg, so skýggja tey eldin. Men tað eru ikki børn, ið ráða fyri, hvørt Føroyar skulu vera ella ikki vera.
Høvdu tað havt verið børn kundi man verið vissur um, at tað eftir seinna heimsbardaga aldrin vóru komnir togarar inn aftur á okkara grunnar. Tíverri, tað eru vaksin, ið ikki hava evnað so frægt sum børn. Mest markanta dømið um hetta er formaðurin í Fiskivinnunevnd løgtingsins, ið skjótt einsamallur fer í søguna sum hann, ið gav fiskastovnunum banasár.
Henrik Old, ið situr í mest maktfulla fiskivinnupolitiska sessinum, tykist ikki taka nøkur initiativir til nakað tað slag, ið munar, burtursæð frá at hann brúkar eitt hvørthøvi, ið býðst til at niðurgera okkara fiskifrøðingar, ið hann leggur undir alt ilt. Tílíkur maður átti ikki átt ábyrgd av nøkrum sum helst, ið hevur við fiskivinnu at gera. Honum á baki hava vit so alla restina av tingmanning javnaðarflokksins, Vilhelm Johannesen, Jógvan Adolf Johannesen og Maritu Petersen sum eins og restin í hesum tingmannabólki blæsir og hevur mjøl í munninum alt í senn. Um landsstýrismanning javnaðarflokksins kann sigast, at hon vaskaði sær hendurnar í forhond, tá býtið av málsøkjum fór fram. Um nakar javnaðarflokkur verður at síggja til eitt komandi val er tað sera trupult at gykla sær, flokksleiðslan tykist ikki hava skilt ein pinn av, hvat tað er, sum fyriferst! Spurningurin er so, hvat veljarar flokksins fara at finna uppá? Eitt er vist, mandatið verður ikki kastað út í tóman heim enn einaferð. Tað, ið fyriferst í øðrum flokkum, er ilt at meta um, annað enn at oddagreinsskrivarin í Dimmalætting tykist hava til felags við oddagreinsskrivaranum á Sosialinum, sama ampa av tí væntandi fiskivinnupoltikkinum. Ferð eftir ferð hava teir lýst eftir onkrum ítøkiligum, men so eiðasørt! Hvørki sambands- ella javnaðarflokkurin so mikið sum kveiklast við. Í tjóðveldisflokkinum er tað Heini úr Kunoy, meðan teir smartu í flokkinum ikki taka fisk uppá tunguna.
Fólkaflokkurin heldur fram við at trola og trýr at várharra finnur seg í at man grovt ger seg inn á skapannarverkið.
Burtursæð frá skiparanum úr Leirvík. Og so eru tað allar kultirnar, sektirnar og tey frelstu. Vit vita og vit síggja orsøkirnar til, at okkara fiskastovnar eru deyðakomnir, men vit røra ikki hond frá síðu til tess at binda niður hesar ótálmaðu negativu kreftir, sum hvørt einasta samdøgur ríva stór sár í holdið á okkara grundarlagi fyri lívi! Vita skulu tit, at tað eru eingi kompromissir møgulig úti á grunnum!
"Tað er antin ella"
t.e. Lív ella deyð!

HENDIR EINKI NÚ TAPA VIT ALT

Vit standa til at tapa, ikki bert alt framleiðsluapparatið á landi, men herumframt kemur so tað, at verður tað hildið fast um verandi flota til hann søkkur, tá eru grunnarnir hóttir og tað er alt. Úrslitið verður, at botnviðurskiftini, ið helst er størsta orsøkin til minkingina í regeneringsratunum, tey fara at versna uppaftur meira, og vit missa tá fiskin heilt, tí lívskorini á bankunum versna fyri hvønn dag, sum gongur, so leingi vit halda fram at brúka destruktivar mátar at taka fiskin við.
Tað er bert ein vegur burtur úr hesi deyðans gongd, tað er at fáa skift flotan út ella at steðga heilt at fiska við botnskravandi veiðiamboðum, v.ø.o. at taka togaraflotan út, í tann mun vit evna at byggja nýggj skip at seta inn. Ein annar máti kundi verið at fingið fíggjað eitt fiskistopp og ein triði og seinasti møguleiki var:
At at søkka togaraflotan. Jú men hann stendur í einum bókaðum virði uppá ena góða milliard, tað ber simpulthen ikki til, verður sagt.
Um hann so stendur í fleiri milliardum, hvat er hann verdur, tá fiskurin, ið ikki kann forrenta hann, er horvin með alla!
Hygg eftir Canada hvat kunnu teir brúka skramblið til?
Hesin spurningur er ivaleyst hin mest átrokandi at taka støðu til, nú tað skal gerast av, hvørt Føroyar og føroyingar, skulu bjargast ella fortapast.



Tað eru fáir fundir um fiskivinnu, har John Smith ikki tekur orðið og orðaskiftið heldur sum oftast fram í kaffipausunum ella eftir fundirnar. Mynd jan

BLOKKMENTAN

Blokkframleiðsla er eitt samlibandsfenomén og forútsetur, at alt verður einsrættað, serliga er takið at fáa arbeiðstímatalið niður á eitt absolutt minimum, allar best um arbeiðsfólk ikki vóru neyðug, eisini sjálvt um keypiorkan tá hevði fingið eitt rættuligt høgg niður eftir, tað interesserar ikki kredittfelags- og bankaleiðslurnar minsta vetið, (jfr. "fiskaeygu"- Strárup úr DDB, tá hann harmaðist vanliga alminduliga føroyska borgaran, ið hann kensluleyst spennir fyri oki, at gjalda tað, ið DDB slapp sær undan at gjalda!) tí samfelagið, tað vil siga vit, vit telja ikki við í teirra telvingum) Eisini er eitt av fremstu málunum at fáa standardiserað "rávørutilgongdina", fastar nøgdir, fastar tíðir, o.s.fr. Og eitt hitt mest brúkta argumentið móti húkaveiðu hevur verið hetta, at hendan ikki skal hava kunnað tryggjað javna tilgongd til virkingar á landi. Eg loyvi mær enn einaferð at vísa til stabbamyndirnar viðvíkjandi snelluflotanum, tá er skjótt at koma til ta niðurstøðu, at hetta hevur ongantíð verið roynt, og tað hevur heldur ikki nakrantíð verið ætlanin, at hetta skuldi roynast. Frá 1964 byrjaði negativa tosið um, at einki álit var í útróðrinum og í 30 ár hava togaralobbyistar gjørt hesi sjónarmið galdandi, í so stóran mun at øll: børn, vaksin, kvinnur og menn til eina og hvørja tíð, í forhond siga - jú - men togararnar megu vit halda fast um, hvør skal annars taka upsan? Eg vil siga, at hettar hevur verið dýrasti setningur føroyingar nakrantíð hava latið koma um sín munn.

ERU VIT BLIND

Eitt líka so stórt paradoks, er áskoðan teirra ráðandi, á føðiketuproblematikkin: Tað er at undrast á, at garvaðir (bankaformenn og stjórar, kredittfelagsleiðslur, stjórar í fíggingarfeløgum) allir handlandi í peningi, ikki taka og skriva sær orðatakið aftan oyra, hetta sum verður tað gloymt tekur botnin undan øllum óansæð: Orðatakið: "Hvør av øðrum liva má."
Men ikki tykkum at siga, sum tað er tilfellið við føðiketuni úti í sjónum, so kunnu heldur ikki pilkast lið burtur úr ketuni í einum samfelag uppi á landi. Verða bólkar skræddir burtur úr, so dettur grundarlagið undan teim fólkum, ið livdu av keypiorkuni hjá teimum, ið vórðu skrødd burtur - skriðan loypur!
Tá ein tíð er umliðin hava allir partar mist alt.
Tað, sum hetta alt, stutt sagt, snýr seg um, gevur okkum ikki nakað val.
Tað er ein spurningur um vit ella tit - um teir ella okkum.
Vinna teir, tapa vit!
Kreditorkonceptið innan føroyska fiskivinnu er ikki bygt á nakra samvinnu tíansheldur samkenslu: Tað byggir á eina distanta "rakar ikki okkum" filosofi mest lík støðuni hjá einum "raid" bólki, tá hann tekur seg út aftur, úr einum øki eftir eitt stutt "raid": "Vit taka okkum aftur- syrgið fyri at fáa tað við, sum er okkara!"- Málsetningurin er sambart filosofiuni: Negativur og destruktivur.
Árinið verður meira og meira oyðileggjandi fyri Føroyar og føroyingar.
Motiveringin er at mjólka, til kúgvin sleppur og doyr!
Motiveringin hjá eigarunum (Kreditorunum) forðar sostatt eisini, at hesi stakkals fólkini, dag til dag-leiðsla og arbeiðsfólk, eitt nú innanveggja í pf. Fiskavirking, sum royna alt tey kunnu og orka, hesi verða hildin fyri gjøldur, tí tey fáa neyvan annað at vita, enn at tey skulu kýta seg enn meira, og so onkra tátu um at nú hendir tað og so fáa vit tað.
Av góðum grundum fáa tey einki at vita um, at Fiskavirking hevur ikki nakra framtíð, tí mest sannlíkt eru ongar ætlanir um nakra framtíð.
Tey kunnu ikki vita, at eigararnir bert hava eitt mál, tað er at fáa bjargað sum mest av prioritetspeninginum aftur, so skjótt sum gjørligt. Tey, ið vinna har - og restin av tí burtsaneraðu arbeiðsmegini - sleppa ikki til arbeiðis aftur við nøkrum, sum nakað skil er í - td. at gera sticks og fiskafingrar úr blokki, ið verða framleiddir á pf. Fiskavirking.
Ella at framleiða portiónir til keturnar, ella bara rein frísk og fesk fløk, ið ikki kann fást burtur úr togara tøðum. Men her hendir einki, verða tað ikki gjørdar fløgur, í nakað sum helst. Tess vegna: "Eydnast ikki nú at purra politistk út, er enn einaferð neyðugt at skifta løgtingið út, so setast kann eitt løgting, ið torir at bjarga Føroyum og føroyingum"
Fyrst og fremst við at bjarga fiskastovnunum við Føroyar. Fáa gjørt neyðuga, nýggja fiskivinnupolitiska lógarverkið: Ein nýggjan flotapolitik (togararnar út og húkin inn aftur), umframt at fáa smíðað nýggju fiskivinnupolitisku lógirnar, ið skulu galda á landi. (gera upp við kreditor-konceptisku fiskavirkingarpíningarnar), (Seta úr gildi stavnsbandið) og sjálvir taka ábygdina av eigaraviðurskiftunum, seta sær nýggj mál innan fígging, framleiðslu og útboð av háverdugum fiskaúrdráttum.
Tað hevur skund.

jsmith.